## DAGSINS MEINING

# Patent uppá rangt og rætt

Nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum hevur ein keðiligan óvana, og tað er at sláa fast hetta og hatta og fortelja fólki, hvat er tann rætta søgan. Fólk, ið proklamera "tað einasta rætta", kunnu ongatíð gera semjur, tí tey hava rætt uppá forhond, uttan nakra diskussión, og tað er – fyri at siga tað pent – eitt politiskt handikapp. Vónandi ætlar Tjóðveldisflokkurin sær ikki niður á Fólkating fyri at definera fyri danska fólkinum, hvat er rangt og hvat er rætt.

Vit kunnu gera sera skjótt av, og fortelja Tjóðveldisflokkinum, at valskráin hjá teimum til Fólkatingið er fyri ein stóran mun gjøgnumførd frammanundan.

Føroyingar eiga rættin til allar inntøkur úr undirgrund Føroya. Kolvetnisskattaskipanin er samtykt, og lóggávuverkið er liðugt. Hetta punktið kann strikast av eini fólkatingsvalskrá, tí ikki tænir tað nøkrum endamáli at sáa iva um hettar. Tað einasta man kann fáa burturúr tí er óneyðugt rok í tí léttara endanum av fjølmiðlaheiminum, har vit finna danska Ekstra Bladet og onnur skandalujakstrandi tíðarrit úti sum heima. Marghattligt nokk sær út til, at tey einastu, ið undirbrotliga ganga og ivast eru Tjóðveldismenn.

Eisini er tað sera marghátttligt og ikki sørt átaluvert, at Tjóðveldisflokkurin gongur og tilleggur danska Fólkatinginum meira vald, enn tað hevur. Tjóðveldismenn vilja, at danska Fólkatingið skal vælsigna hvørja formalistiska orðing. Føroyar eru ein tjóð, og tað skapar ikki virðing ella álit, um menn fara at ganga og aka á knøum niðri í Fólkatinginum fyri at fáa teir at siga hetta.

Tann dagin vit proklamera okkum sjálvi natión – og tað kunnu vit gera nær sum helst – so hava vit loyst. Danska Fólkatingið hevur sagt, at tað sjálvandi virðir eina føroyska avgerð, so hatta punktið kann Tjóðveldisflokkurin eisini hóskandi strika av síni valskrá, tí tað málið er loyst – ella kann til eina og hvørja tíð loysast, um teir tora.

Einasta forðingin fyri loysingina liggur í Føroyum, og stór skomm er, at fara útum landoddarnar at royna at fáa stuðul til eina ætlan, sum ikki hevur undirtøku í Føroyska fólkinum. Fáa tjóðveldismenn fólkatingsumboð, so skal umboðið vátta, at tað vil virða donsku grundlógina. Danska grundlógin kann ikki umfata fleiri natiónir sum er, men vit kunnu loysa nær sum helst, um vit eru ónøgd við tað. Raðfylgjan má vera tann rætta – vil man kalla seg natión í ST høpi, so má man útum grundlógina, og er eingin trupulleiki við tí. Spurningurin er bert, um vit føroyingar vilja tað – og har er svarið heilt greitt nei.

**Sosialurin**

## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Kunna danir um Føroyar

**Elin Lindenskov**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Endamálið við politikkinum hjá Javnaðarflokkinum á Fólkatingi er at samstarva og finna loysnir. Rikni politikkurin hevur víst, at samstarvið millum Føroyar og Danmark ikki hevur verið gott, og at viljin til at finna loysnir hevur skortað. Hetta hevur ført til, at partarnir verða settir upp ímóti hvørjum øðrum, so einki fæst burtur úr.

Vit fara at brúka fólkatingsumboðanina til at upplýsa og kunna danir um føroysk samfelagsviðurskifti. Ymsar danskar sjónvarpssendingar um Føroyar og ymsar útsagnir frá donskum politikarum og »serfrøðingum« vísa, at almenna vitanin um Føroyar í Danmark er ov lítil. Fyri at fáa eina loysn á ríkisrættarligu viðurskiftunum er tí eisini neyðugt, at almenna vitanin millum danir um Føroyar er størri.

Mítt uppskot er, at farið verður undir eitt skipað kunningararbeiði í Danmark. Hetta kunningararbeiðið, saman við tí kunningararbeiði, sum er gjørt í Føroyum við t. d. Hvítubók og í Grundlógarnevndini, skal verða við til at leggja støðið fyri Sjálvstýrislógini. Tað er eyðsæð, at fólksligi stuðulin er ein treyt fyri nýggju ríkisrættarligu skipanini fyri Føroyar.

# Vit koma á mál

**Signar á Brúnni**



Jóanes bóndi segði við íslendingar í 1930 : Tit ganga undan, vit koma aftaná.

Sipað varð til fullveldistøku íslendinganna í 1918.

Ongantíð havi eg ivast í , at hesi orð bóndans fóru at ganga út, men spurningurin er bara, nær koma vit aftaná.

**Føroyingafelagið**
Føroyingafelagið, ið varð stovnsett fyri meira enn hundrað árum síðani, setti sær høg mál - føroyingar skuldu ganga fram í øllum lutum og gerast sjálvbjargnir.Teir náddu langt.Á tí mentanarliga økinum fór fram ein sonn kollvelting, men málið um at gerast sjálvbjargnir hevur gingið meira striltið.

**Fólkaatkvøðan í 1946 - heimastýrislóg í 1948**
Í 1946 atkvøddi meirilutin av føroyskum veljarunum fyri fullum tjóðarfrælsi ,

Men fólksins vilji varð kveisraður til viks, og ístaðin fingu vit eina heimastýrislóg.Hansu við Høgadalsá, ið var tingmaður Tjóðveldisfloksins í mong ár, plagdi at nýta myndina, at føroyingar spældu fólk í húsi, undir heimastýrisskipanini.Ein beinrakin mynd.

Vit hava nú í mong ár stríðst fyri at fáa nevndu heimastýrislóg avtikna ella broytta, men vit mugu ásanna, at striltið hevur gingið, samanhald millum sjálvstýrisflokkarnar hevur ikki verið nóg gott.

**Sjálvstøðug tjóð**
Sitandi samgonga hevur lagt nógva orku í, at fingið eina nýggja skipan, ið gjørdu okkum til eina sjálvstøðuga tjóð, eins og hini norðurlondini.Tað hevur eydnast samgonguflokkunum at staðið saman , men tað eru aðrir , ið hava lagt bæði løgfrøðiligar og politiskar fótonglar fyri okkum, danskir politikkarar, ið hevur borið í sær, at vit ikki enn eru náddir tí máli, vit settu okkum.

**Eitt bragd**
Vit valdu so aðra loysn, at yvirtaka so nógv sum møguligt eftir heimastýrislógini. Landsstýrisflokkarnir stóðu saman - samanhald gevur styrki - og vit hava megnað at skorið heildarveitingina niður við einum triðingini.Ein søgulig hending - ja einki minni enn eitt bragd fyri sjálvstýrisrørsluna í Føroyum. Nú ræður um samanhald komandi árini, so vit náa tí setningi, ið landsstýrissamgongan setti sær at náa.

**Á danating**
Á fólkatingi hava føroyingar rætt til tvey umboð. Hesaferð haldi eg at tað hevur alstóran týdning fyri fullveldistilgongdina, hvør verður valdur at umboða okkum føroyingar á danatingi. Er tað ein fullveldispolitikkari, so ber hann fullveldis sjónarmiðini fram, er tað ein sambandspolitikkari, so verða sambandssjónarmiðini førd fram.

Ikki er neyðugt at siga, at tjóðveldisflokkurin hevur gingið á odda í stríðnum at gera okkum sjálvbjargnar , og tí hevði tað verið ein fongur fyri sjálvsstýrisrørsluna, um hon fekk eitt tjóðveldisumboð at tala sína søk á danatingi.Tá koma vit skjótari á mál.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Hví taka vit ikki við tí ábyrgd vit hava?

**Gunnar K. Nattestad**
*valevni til fólkatingsvalið*

Meðan kreppan var, smoygdu nógvir politikarar og onnur sær undan allari ábyrgd. "Vit vistu einki, vit kundu ikki gera nakað, hini hava alla skylduna osv." Men, nú tað gongur væl, hava vit allan heiðurin og æruna.

Hvat er so broytt hesi árini?

EINKI!!!!

Nei, stórt sæð ongar av umstøðunum, ið skylda var uppá, eru broyttar. Vit eru í somu ríkisrættarligu skipan, men nú gongur tað gott.

Niðurstøðan er:

- Vit mugu taka við tí ábyrgd vit longu hava og ikki renna undan.

- Vit mugu broyta ríkisrættarliga har feilir og manglar eru staðfestir, men til tess krevst ikki loysing.

- Fullveldið er eitt val - ikki ein fyritreyt!

Tað er syrgiligt at síggja Føroya Landsstýrið fara niður og blívað skelkað trýggjar ferðir á rað, av at hoyra somu boð: Fullveldið, her og nú, merkir at vit skulu gjalda her og nú.

Men - búskaparlig ábyrgd er eins neyðug innanfyri ríkisfelagskapin; ja enntá meiri neyðugt. Tað er kanska her so nógv hava misskilt okkurt. Tey halda at ríkisfelagskapur rættvísgerð ella loyvur ábyrgdarloysi. Men hettar bleiv so dyggiliga mótprógva í kreppuni. Innanfyri ríkisfelagskapin hava vit møguleika til at laga okkum til búskaparligt sjálvbjargni, sum umstøðurnar loyva tí.

Vit hava ábyrgd. Spurningurin er bara um vit vilja taka við henni, ella um vit framhaldandi velja at líta yvir um hegni, og halda at grasið er so grønt hinumegin - um vit bara vóru har so var alt ok!

Nei, lat okkum heldur fara til verka og brúka tær talentir vit hava fingið; eisini tær vit hava grivið niður. Tað er eingin ivi um, at standa vit saman og leggja aggið aftur um eina løtu, so kunna vit í felag byggja land, til æru fyri okkara Skapara og til signing fyri fólkið - eisini tey, ið búgva í neyð og vesaldómi uttanfyri okkara landoddar.

Vel tí fólk á Fólkating og Løgting, ið ynskja at byggja upp, heldur enn at bróta niður, ið skapa álit og virðing heldur enn missálit og vanvirðing!

# Javnaðarflokkurin misskilt sjálvsavgerðarrættin

**Kristina Háfoss**
*Fólkatingsvalevni hjá Tjóðveldisflokkinum*
*www.hafoss.com*



Hósdagin í undanfarnu viku, førdi Jóanes Eidesgaard fram í bløðunum, at danska stjórnin longu hevur viðurkent sjálvsavgerðarrætt føroyinga. Hetta er ein misskiljing. Danska stjórnin hevur gjørt púra greitt, at hon ikki viðurkennir føroyingar sum tjóð við tjóðarrættindum - eitt nú sjálvsavgerðarrætti.

**Hvat er sagt ?**
Danska stjórnin hevur - fer aftaná fer - sagt, at tað er føroyska fólkið, ið avgerð framtíð Føroya. Hetta kunnu vit verða samd um, men samstundis sigur stjórnin, at danska fólkatingið skal viðurkenna eitt úrslit av eini føroyskari fólkaatkvøðu. Hervið er sjálvsavgerðarrættur føroyinga fokin - tí uttan mun til hvørja støðu stjórnin tekur, so hevur hon seinasta og avgerandi orðið.

Hetta er ein av orsøkunum til, at tað hevur avgerandi týdningi, at sjálvsavgerðarrættur føroyinga verður viðurkendur av dønum. So leingi hetta ikki er støðan kunnu føroyingar ikki einsíðis taka avgerð um at skipa Føroyar sum tjóðveldi og heldur ikki fáa javnbjóðis samráðingar.

Føroyingar kunnu sjálvsagt velja at síggja burtur frá donsku stjórnini og føra úrslitið av eini fólkaatkvøðu út í lívið uttan mun til, hvat danska stjónin sigur - men tað er ivasamt, um úrslitið av eini fólkaatkvøðu verður viðurkent á altjóða leikpallinum um ríkisstjórnin ikki viðurkennur hetta.

**Hvat varð sagt í 1946 ?**
Undan fólkaatkvøðuni í 1946 gjørdi danska stjórnin - eins og nú - føroyingum greitt, at hon vildi viðurkenna úrslitið av fólkaatkvøðuni. Men tá ið úrslitið av fólkaatkvøðuni varð ein meirluti fyri føroyskum fullveldi, vildi danska stjórnin - sum kunnugt - ikki viðurkenna úrslitið hóast alt. Tað var við eitt ikki nógmikið, at ein lítil meirluti tók undir við føroyskum sjálvstýri og fólksins avgerð varð tískil skúgvað til viks.

Hví skulu vit vænta, at tað verður øðrvísi hesuferð?

**Hvat verður sagt í dag ?**
So seint sum í ár - við orðaskiftið í fólkatinginum um føroysk viðurskifti - segði Peter Duetoft, fólkatingslimur og formaður í Færøgruppen, at um fólkaatkvøða verður í Føroyum um ríkisrættarligu støðu Føroya, so ynskti hann, at ein stórur meirluti tók undir við, at Føroyar skulu gerast sjálvstøðugar, um avgerðin veruliga skuldi kunna viðurkennast.

Hvussu stórur meirluti ? Skal minnilutin avgera framtíðina hjá meirlutanum? Skal danska stjórnin avgera hvussu stórur meirlutin skal verða ? Nógvir spurningar stinga seg upp.

Hartil kemur, at umboð fyri donsku stjórnina hava - undir samráðingunum sligið fast - at í Danmark, Føroyum og Grønlandi er bert ein tjóð og tað er tann danska tjóðin.

So leingi danska stjórnin hevur hesi sjónarmið kunnu føroyingar ongantíð fáa javnbjóðis og virðiligar samráðingar við donsku stjórnina.

Sjálv meti eg, at tað er ræðandi at hoyra, fólkatingslimir og ministarar koma við tílíkum staðfestingum - sjálvt í ár 2001. Men hetta er tíverri veruleikin.

**Altjóða rættur og rættindi**
Um hugt verður at altjóða rætti - eisini nevndur fólkarættur - er greitt, at allar tjóðir hava sjálvsavgerðarrætt tvs. m.a. rætt til sjálvar at avgerða stjórnarrættarligu støðu teirra. Somuleiðis staðfestir altjóða rættur, at til tess at verða viðurkent sum tjóð, skal eitt fólk uppfylla hesi krøv:

- Støðugt fólk
- Avmarkað landaøki
- Ríkisstjórn
- Evni til at samskifta við onnur ríki

Ikki skuldi verið neyðugt at nevnt, at Føroyar lúka øll hesi krøv, og tískil eru Føroyar ein tjóð við sjálvsøgdum tjóðarrættindum - eisini sjálvsavgerðarrætti.

**Trupulleikin: Ongin viðurkenning**
Ein viðurkenning av sjálvsavgerðarrætti føroyinga er soleiðis ein viðurkenning av, at føroyingar einsíðis kunnu taka avgerð um stjórnarrættarligu støðu Føroya og somuleiðis, at føroyingar eru tjóð við tjóðarmáli, ognarrætti, rætti til javnbjóðis og virðiligar samráðingar o.s.fr..

Henda sjálvsavgerðarrætt v.m. hevur danska stjórnin ikki viðurkent - hóast hesi rættindi føroyinga eru staðfest í altjóða rætti - og tað er júst hetta, ið er trupulleikin.

# Fólkið Fyrst

**Hans Jørgensen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Fólkatingið*



Hetta er valparolan hjá Javnaðarflokkinum. Hon kemur ikki úr leysum lofti, tí tað skerst ikki burtur, at tey seinastu tíggju árini er fólkið sett afturum í røðina. Fyrst kom búskaparkreppan, sum fyrst og fremst rakti gomul, sjúk, barnafamiljur, tey førleikaskerdu, tey veikastu á arbeiðsmarkninum tey lágløntu og kvinnunar.

Í kjalarvørrinum av kreppuni kom nationalisman á dagskránna. Nú ráddi um at finna syndabukkar, og léttast var at útnevna danir. Síðani hava flokkarnir, sum seta lívskorini hjá tí einstaka aftast, gjørt alt fyri at gera danir til fíggindar okkara nr. 1.

Lívskorini hjá fólkinum skulu tigast burtur. Tey halda tað vera alt ov dýrt at veita pensjónistum 10.000 kr. um mánaðin og útvega røktarpláss til tey gomlu, sum ikki klára seg sjálvi heima. Hvussu ofta hoyra vit ikki Høgna Hoydal og floksfelagar hansara ávara ímóti, at Javnaðarflokkurin má ikki sleppa framat aftur, tí so fara teir at oyðsla alt burtur. Við øðrum orðum: Sleppur Javnaðarflokkurin aftur at veita tí gamla eina sámuliga pensjón, tí røktartreingjandi hóskandi røkt heima, í sambýli ella heima við hús, tí sjúka neyðuga heilsubót, tí brekaða hóskandi bústað, tí unga haldgóða útbúgving, ja, so fer loysingin fyri bakka, og tað er fyri teimum tað altavgerandi.

Tað var fólkið, sum lyfti landið úr aftur armóðini. Men tað skal krógvast burtur í evindaliga tosinum um illavorðnar danir og tað nationala frælsið, sum í veruleikanum kann vera ófrælsi hjá tí einstaka.

Vit í Javnaðarflokkinum vilja hava politiska orðaskiftið inn á rætta kós aftur. Vit seta Fólkið Fyrst. Lívskorini hjá fólkinum skal á skránna.

Tað ringasta, sum kann henda, er, um nationalistamótpolarnir Sambandið og Tjóðveldið fáa fótin fyri seg aftur. Eydnast teimum tað, so kunnu vit gloyma vælferðarsamfelagið. Tað má ikki henda.

Eg fari inniliga at heita á allar veljarar um at vísa, at fólkið í Føroyum ikki longur góðtekur, at tokutalan um samband ella loysing skal vera ovast á breddanum. Nú krevja vit, at lívskorini hjá fólkinum koma fremst í politiska kjakið.

Fólkatingsvalið er tí ikki bara eitt svar frá veljarunum um, hvør skal umboða okkum í Fólkatinginum, men enn meira eini boð um, hvønn politikk føroyingar veruliga ynskja:

Fólkið fyrst - so er tað Javnaðarflokkurin

Fólkið afturum í raðið - so Samband, Tjóðveldi, ella Fólkaflokk.

Veljið Fólkið Fyrst - veljið Javnaðarflokkin